gult cyan magenta svart



Undirvísingar- og mentamálstýrið

## Stuðulsstovnurin

# Málsviðgeri/skrivari

*Starvið*
Á Stuðulsstovninum er eitt áhugavert starv sum málsviðgeri, skrivari, journalleiðari v.m. leyst at søkja.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a.:
- Málsviðgerð
- Skrivari hjá leiðara
- Upprættan og røkt av nýggjari journalskipan
- Røkt av heimasíðu
- Kæruumsiting
- Vanligar skrivstovuuppgávur

*Førleikakrøv*
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar hava
- Skrivstovuútbúgving og HH/student ella líknandi
- Royndir innan økini, ið verða nevnd undir høvuðsuppgávunum
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Fyrikomandi og góð samstarvsevni
- Førleika til at arbeiða sjálvstøðugt

*Vit bjóða:*
- Eitt ábyrgdarfult, áhugavert og fjølbroytt starv í einum stovni í menning
- Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning

*Setanar- og lønartreytir*
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í 15. lønarflokki.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalstýrið og deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

Stuðulsstovnin
Stílað: Terja á Lakjuni
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 26. juli 2000 kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Terja á Lakjuni, leiðara á Stuðulstovninum, á telefon 31 96 80 ella 44 47 39.

*Stuðulsstovnurin er ein stovnur undir **Undirvísingar- og Mentamálastýrinum**, ið hevur til uppgávu at veita fíggjarligan stuðul til lesandi føroyingar.*
*Á **Stuðulsstovninum** starvast 5 fólk. Stovnurin rindar mánaðarligan lestrarstuðul til umleið 2.000 lesandi í Føroyum og árligan ferðastuðul til umleið 1.300 lesandi uttanlands, umframt at veita lestrarstuðul til lesandi uttanfyri Norðurlond (ÚSUN). Harumframt krevur stovnurin inn lestrarlán frá umleið 4.000 persónum. Stuðulsstovurin hevur í 2000 eina útreiðslujáttan uppá 1,9 mió. kr., og veitt uml. 54,2 mió. kr. í lestrarstuðli.*

---

**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum • 370 Miðvágur**
**Tlf. 332600 Fax 333604**

## Starvsfólk

Lýst verður eftir starvsfólki til reingerð á heiminum at byrja 15. september 2000. Arbeiðstíðin er 139 tímar yvir 4 vikur.

Freistin at senda umsókn inn er 1. september 2000.

Umsóknir við møguligum prógvum og arbeiðsroyndum verður at senda til:

**Stýrið fyri**
**Ellis- og Avlamisheimið í Vágum**
**370 Miðvági**

---

## Summarfrí

Vegna summarfrí verður skrivstovan stongd frá mánadegnum 17. juli til mánadagin 7. august.

**STARVSMANNAFELAGIÐ**

---

## Summarfrí

Vegna summarfrí er Sjúkrakassin stongdur frá 17. juli 2000 til 6. august 2000.

Havnar
**SJÚKRAKASSI**

---

## Fá ókeypis ráðgeving áðrenn tú byrjar nýtt virki

Hugsar tú um at byrja við egnum virki? So kannst tú fáa serkøna ráðgeving áðrenn tú byrjar. Við skipanini "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av fyritøku" kannst tú fáa ráðgeving fyri kr. 7.000,- hjá Virkisráðgeving Sp/f sum hjálpir tær í gongd.

- Ráðgevin verður tín samstarvsfelagi, tá ið tú avgerð at byrja við egnari fyritøku
- Tú fær hjálp til at gera eina virkisætlan, ið lýsir fullt út títt hugskot
- Tú fær eisini at vita um so er, at ætlanin ikki tykist burðardygg
- Virkisráðgevin kann eisini vísa til aðrar ráðgevarar, um tað gerst neyðugt

Ynskir tú at vita meira um "Ókeypis ráðgeving áðrenn byrjan av egnari fyritøku" so ring til TK-stovuna.

**TK-STOVAN**
Niels Finsensgøta 37 • 100 Tórshavn
Tel. 31 73 66 • Fax 31 93 63

Sosialurin - 311820

---

Almanna- og Heilsumálastýrið
Starvsfólkadeildin

*Rætting til lýsing sum*

## Málsviðgeri

**Talan er um eitt starv á 3/4 tíð**

Eitt starv sum málsviðgeri á økisdeildini á Almannastovuni í Tórshavn er leyst at søkja til setan 1.9.2000.

**Um deildina**
Arbeiðsøkið hjá økisdeildini er ráðgeving og vegleiðing í persónligum og forsorgarligum spurningum, og støðutakan til og fyriskipan og avgreiðsla av veitingum og tiltøkum sum sambært forsorgar- og barnaforsorgarlógunum.

Á deildini arbeiða 13 fólk.

**Arbeiðsuppgávur**
- málsviðgerð
- innheintan av skjalaprógvum og upplýsingum í sambandi við umsóknir um forsorgarhjálp
- útrokning, umsiting og útgjald av veitingum til undirhalds
- fyrisitingarligt arbeiði
- vanligt skrivstovuarbeiði

**Útbúgvingarkrøv og royndir**
- skrivstovuútbúgving ella onnur hóskandi faklig útbúgving
- royndir innan almenna fyrisiting
- góðan kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góðan málburð í føroyskum bæði munnliga og skrivliga

**Lønir- og setanartreytir:**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið og lønt í lønarflokki 9, 12 og 15.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Birgit Christiansen, skrivstovufulltrúa á tlf. 315480.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til:
Almanna- og heilsumálastýrið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 3. august 2000 kl. 14.00**

---

**Ellis- & Avlamisheimið í Vágum • 370 Miðvágur**
**Tlf. 332600 Fax 333604**

## Sjúkrasystir

Lýst verður eftir sjúkrasystir 0,46 tíð at byrja 15. oktober ella eftir nærri avtalu. Møguleiki er at fáa meiri arbeiði í komandi ári.

Umsóknarfreistin er 1. september, og verður at senda til:

**Stýrið fyri**
**Ellis- og Avlamisheimið í Vágum**
**370 Miðvági**



## Leiðari søkist til Barnagarðin á Teiginum

Av tí at ov fáar umsóknir komu inn fyrru ferð søkt var, verður hervið søkt av nýggjum eftir leiðara til Barnagarðin á Teiginum á Sandi at byrja 15.08.2000 ella skjótast tilber eftir hendan dag.

Starvið er eitt fulltíðarstarv.

**Vit sóknast eftir leiðara:**
- Sum hevur útbúgving sum pedagog ella líknandi, um eingin við pedagog útbúgving søkir verður annar umsøkjari settur
- Hevur leiðaraevni
- Hevur hug at vera við at seta dám á endamálsorðingina fyri stovnin
- Sum er opin fyri nýhugsan
- Í samstarvi við nevndina og foreldur gera teir fysisku karmarnar klárar

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Pedagogfelag.

Meira fæst at vita við at venda sær til bygdarráðsskrivstovuna tlf. 361034.

Umsóknir saman við viðmæli og upplýsing um útbúgving, skulu í seinasta lagi 25. juli 2000 sendast til Sands Bygdarráð, 210 Sandi.

**Sands Bygdarráð**

---

## Pedagogur

Undir Almanna- og Heilsumálastýrinum við fyribils tænastu á bústovninum Eirargarði 16A/16BN eru tvey pedagog størv leys frá 1. sept. 2000.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, harav fleiri umframt hava likamlig brek.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjararnir eru likamliga væl fyri og eru áhugaðir at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og eru opnir fyri nýhugsan. Harafturat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt og at samstarva við onnur, umframt at vera førr fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og roknast skal við morgun-, kvøld-, náttar- og vikuskiftisarbeiði.

Størvini eru tænastumannastørv sett eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Føroya Landsstýri, lønt í lønarflokki 11-17 + viðbót.

Nærri fæst at vita um størvini frá fyristøðufólkinum á stovninum Aivi í Pætursastovu á tlf. 315422/315423

Umsóknarfreistin er 31. juli 2000 og skulu umsóknir sendast til:

**Bústovnurin, Eirargarður 16A/16BN**
**Att. Bjørg Mohr**
**Eirargarður 14-16**
**FO-100 Tórshavn**

---

## Undirvísingar- og Mentamálastýrið

# Málsviðgeri

**Starvið**
Í sambandi við at eitt av starvsfólkum okkara er farið í annað starv, er eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum málsviðgeri leyst at søkja á próvstovuni.

Høvuðsuppgávurnar verða m.a. at:
- Málsviðgera
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur á próvstovuni (innstilling til próvtøku, skemalegging, tekstuppgeving o.a.)
- Saman við uppgávunevndum o.ø., gera próvtøkuuppgávur klárar til prentingar (skriva tekstir, gera uppseting (lay-out) o.a.)
- Prenta, pakka og senda próvtøkuuppgávur til allar skúlar í skúlaverkinum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til próvstovuna (t.d. samskifti við próvdómarar o.o.)
- Avgreiða samsýning fyri próvdøming

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a. at umsøkjari hevur:
- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovuyrkinum ella øðrum, ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv (Windows, Word, Acces, Excel, PowerPoint, PageMaker og PhotoShop)
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- Skal kunna arbeiða undir tíðartrýsti

**Vit bjóða**
Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir.

Sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í 12. lønarflokki.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalstýrið og allar deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til:

**Undirvísingar- og Mentamálastýrið**
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 7. august 2000 kl. 15.00.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Bjarna Wilhelm, fíggjarfulltrúa í Undirvísingar- og Mentamálstýrinum, tlf. 355050

***Undirvísingar- og Mentamálastýrið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
***Í aðalstýrinum** eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin er býtt í 3 deildir – fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild – sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.*
***Próvstovan,** sum er í fyrisitingarpartinum av stápinum, hevur til uppgávu at umsita tey praktisku viðurskiftini próvtøkuni viðvíkjandi so sum gerð og prenting av próvtøkuuppgávum og annars at samskifta við uppgávunevndir, próvdómarar og skúlar.*

---

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
**Føroya Gjaldstova**

## Summarfrí

Vegna summarfrí hevur Føroya Gjaldstova afturlatið frá 17. juli til 30. juli. Opið verður aftur tann 31. juli 2000.

**Føroya Gjaldstova**

---

Vit gera alt
URTAGARÐSARBEIÐI

• Grasvøllir • Planting • Viðlikahald
• Seta gravsteinar upp v.m.
• Gera tún við flísum ella oljugrúsi
• Grevstur í sambandi við olljutangaskifti o.a.

Spyr - tað kostar einki!

Við 25 ára royndum hava vit roynt tað mesta

**Fa. SÍMUN DALSGAARD**
Boðanesgøta • FO-188 Hoyvík
Tel. 31 54 78 • Fartel. 28 21 00 • Fax 32 04 78

---

**NÝGGJ FLØGA**

## "Malan"

*við Maluni Eyðunsdóttir*




*SMS · Tel 353535 · Fax 353536*
*E-mail: tryarin@post.olivant.fo*

*Vinarliga send mær:*
*______ eintøk av "Malan", á kr. 159.-*
*Navn: ______*
*Búst.: ______*
*Útfyll lepan, klipp hann út og send hann til: **3-arin, Postboks 1057, 110 Tórshavn***

**FLØGUDEILDIN**